Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Nýggj bók við greiðum endamáli

**- Eg vóni, at bókin "Sóu Jesus eina" fer at geva mongum eina endurnýggjaða sjón av Jesusi og eitt inniligari samfelag við Hann á vegnum heim í dýrdina, skrivar høvundin, Osvald Kjærbo í fororðinum til nýggjastu bók sína.**

BØKUR
*Snorri Brend*

Nakað herfyri kom bókin "Sóu Jesus eina" út í bókabúðirnar. Hetta er bók, sum prædikumaðurin Osvald Kjærbo hevur skrivað.

Bókin er at meta sum ein andaktsbók við íalt 130 skriftbrotum, har endamálið er at vísa lesarunum á Jesus Kristus.

- Inniliga vón mín er tí eisini, at Heilagi Andin skal lata upp eygu tíni sum lesur, so tú sært Harran Jesus – og eina hann sum frelsara og hjálpara í øllum viðurskiftum – bæði andaligum og tímiligum, skrivar høvundin í fororðinum.

Henda bókin "Sóu Jesus eina" er eitt framhald av bókini "Æviga fyriætlan Guds", sum kom út í fjør.

Osvald Kjærbo hevur verið íðin prædikumaður í meiri enn hálva øld, hóast hann hevði annað starv. Hann hevur ferðast nógv millum samkomur, og hevur haraftrat skrivað og týtt fitt av andaligum tilfari.




*- Eg havi roynt at peika á jesus í teimum 130 skriftbrotunum, sum verða viðgjørd í bókini, sigur Osvald Kjærbo um nýggju bók sína "Sóu Jesus eina"*
*Mynd: Bárður*

## Móttøka á Landsbyggifelagnum

Í sambandi vi at Hanus Hansen leggur frá sær sum stjóri, og at Eyðbjørn Brimnes tekur við, verða viðskiftafólk okkara boðin til almenna móttøku á skrivstovu felagsins

*fríggjadagin 15. juli 2005*
*frá kl. 15 til 17.*

**LANDSBYGGIFELAGIÐ P/f**
**Grønlandsvegur 5**
**Tórshavn**

## Tøkk

Eg takki tykkum øllum hjartaliga, sum gjørdu mær 80 ára føðingardagin so hugnaligan við vitjanum, gávum, telegrammum og telefonsamrøðum.

**Albin Simonsen**
**Vestmanna**

## Tøkk til konditaríið

Minnist aftur á mangar góðar løtur sjálvur annar og við vinmonnum mínum.

Er ógvuliga hugnaligt at koma inn og vónandi er langt lív lagað hesum.

**Heilsan**
**Petur av Lofti**

†

Okkara kæra mamma, vermamma og omma

**Thurid Holm Jacobsen,**

**Argir**

andaðist 4. juli í Keypmannahavn, 67 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Hebron, Argir, sunnudagin 10. juli kl. 13.00

**Dánjal Jákup, May-Britt,**
**Magnus og Anna Sofía**

Tey, ið hava hug at geva blómur, kunnu ístaðin geva eina gávu til Akurin í Klaksvík

# Føroyskur kórljómur í Spanien




*Ein partur av sangarunum í kirkjukórinum Ljómi, sum í morgin leggur leiðina til Malaga í Spanien*
*Mynd: Bárður*

**Mikudagin fór Kirkjukórið "Ljómur" á enn eina uttanlandsferð. Í ár gongur leiðin til Andalusien í Spanien**

KÓRSANGUR
*Snorri Brend*

**Vágur:** Eitt sum sangarnir í Ljómi hava glett seg til í langa tíð, er ferðin sum byrjaði á flogvøllinum í Vágum mikudagin.

Tey hava verið á líknandi uttanlandaferðum fleiri ferðir áður, og hava vitjað m.a. í Russlandi, Polen og í Prag, men hesaferð stendur Spanien á skránni.

Í 2003 sang Ljómur m.a. í Århus, og har hitti kórleiðari teirra, Dorthe Tilma ein mann úr Spanien, sum beinanvegin vísti føroyska kórsanginum ans. Og har var stutt frá hugsan til gerð: Hann gjørdi ikki mætari enn at hann beyð kórinum at vitja heimland sítt í ár.

### Føroysk vitjan

Áðrenn tey í Ljómi koma so langt sum til Andalusien skulu tey fyrst vitja í fleiri Norðurlondum. Hóskvøldið var konsert í Lund, Svøríki, í gjárkvøldið í Samuelskirkjuni í Keypmannahavn og í morgin gongur leiðin so víðari til Malaga í Spanien.

Her fáa tey høvið at frambera sangir sínar í kirkjum og mentanarhúsum – andaligar sangir og fosturlandssangir – og fáa helst eisini møguleika at vísa fram tann føroyska dansin. Ætlanin er eisini at syngja okkurt á sponskum máli.

Sum eitt eyka upplivilsi fáa tey eisini høvi at hitta kendu føroysku ferðakvinnuna, Duritu Holm, sum býr í hesum økinum, og sum eisini hevur skrivað eina bók um henda vakra landslutin. Hesa bókina hevur kórið sjálvandi lisið við størsta áhuga undan fráferðini.

Við í ferðalagnum eru 40 fólk, harav 30 eru sangarar í aldrinum 15 árum og heilt upp móti teim 80 árunum.